

# Johan Dahl bjóðar Eysturríki vælkomið á oljuleikvøllin

**Jan Müller**

05.11.2013 - 15:00

Oljan.fo

Mangan hava Føroyar og Eysturríki verið í orrustu á fótbóltsvølli. Men vit arbeiða eisini saman fyri at røkka felags málum, og her er eitt teirra at finna føroysku oljuna. Í gjár varð kunngjørt, at eysturríkska oljufelagið hevur spælt seg upp í ovastu deildina og skal í framtíðini spæla og brúka sína orku og vitan saman við so frægum liðum sum Statoil, Dong og ExxonMobil, í leitingini eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini.

OMV, sum er størsta vinnufyritøkan í Eysturríki og hevur langar traditiónir sum olju- og gassfelag, hevur í fleiri ár verið partur av føroysku leitingini, men nú hevur felagið av álvara sett seg í førarasessin saman við øðrum oljufeløgum.

OMV hevur keypt seg inn í ikki færri enn fimm leitiloyvi á Føroyaøkinum, har Statoil er fyristøðufelag. Norska felagið, sum higartil hevur átt ein rættiliga stóran part í øllum

loyvunum, hevur nú selt burtur av sínum ognarlutum til OMV. Sama hendi, tá ExxonMobil, heimsins størsta oljufelag, kom inn á føroyska vøllin sum viðspælari hjá Statoil fyri fáum árum síðani.

Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálum, fegnast um, at eysturríkska oljufelagið nú er vorðið so virkið á Føroyaøkinum

Johan Dahl: “Tað er gott, at fleiri feløg eru um at bera leitiváðan. Hann er jú stórur í Føroyum. Tess fleiri, ið bera hann, tess størri sannlíki er fyri, at virksemi verður gjørt, sum kanska annars ikki varð gjørt. Og um tað skuldi merkt, at ein brunnur verður boraður, sum annars ikki hevði verið boraður, so er jú nógv vunnið – men hetta er bara ein tanki. Tað vita vit onki um.”

Oljumálaráðharrin vísir á, at OMV undan avtaluni við Statoil bara hevur verið partur av einum loyvi. Nú er tað við í fimm av sjey loyvum á landgrunninum.

“Tess fleiri loyvum, teir eru partur av, tess meira kann roknast við, at teir eru rótfestir í Føroyum.”

Hann heldur hetta eisini vera eitt gott signal til umheimin, at áhugi er fyri føroyska landgrunninum.

“At Statoil farmar niður, kann so fyri onkran tykjast at verða tekin um tað øvuta. Men so nýtist tað als ikki at vera. Í hesum føri sigst avtalukompleksið við OMV, sambært Statoil, at byggja á, at Statoil hevur havt so stóra succes í seinastuni, at teir hava tørv á at fíggja útbyggingarnar, ið standast av øllum fundunum. Og hvør veit – vónandi eisini framtíðar útbyggingum í Føroyum.

Hetta er so úrslitið av einari langari tilgongd, har vit í longri tíð, minst tvey ár, hava merkt ein áhuga frá OMV fyri føroyska økinum. So ting taka tíð,” sigur Johan Dahl, sum eisini vísir á, at umframt avtaluna um Føroyaøkið, so snýr avtalan millum Statoil og OMV seg eisini um, at Statoil selur stórar ognarpartar bæði í Norðsjónum og vestan fyri Hetland.

Statoil søla til OMV góðkend

Tað var annars herfyri, at tað frættist, at norska Statoil hevði gjørt avtalu við eysturríkska oljufelagið OMV um sølu av fleiri ognum í Norðsjónum og vestan fyri Hetland. Avtalan er nú góðkend av avvarandi myndugleikum. Hon fevnir um sølu av 19% av Gullfaks og 24% av Gudrum feltunum í Norra og 30% í Rosebank og 5,88% í Schiehallion feltunum vestan fyri Hetland. Sølan er uppá umleið 15 mia. kr

Statoil, sum herfyri eisini gjørdi avtalu um sølu av fleiri av ognunum á norska landgrunninum til týska oljufelagið Wintershall, fer at brúka pengarnar til ymsar útbyggingar av oljufeltum., sum felagið metir kunnu fáa størri virði sum frálíðir. Felagið stendur fyri sera nógvum stórum og kostnaðarmiklum útbyggingum kring heimin so sum

Johan Sverdrup í Norra, einum gassfelti í Eysturafrika og einum oljufelti í Kanada fyri bert at nevna nakrar. Haraftrat stendur Statoil fyri nógvum leitiboringum komandi árini.

Lesið eisini analysu seinni, har oljan.fo kemur við sínum boð uppá framtíðina á landgrunninum.

Myndir

Johan Dahl, oljuálaráðharri er stæddur á oljumessu í Norra

Stjórin í OMV

Johan Dahl og Rúni M. Hansen frá Statoil

Oljufelt sum OMV hevur gjørt avtalu við Statoil um

Kort av loyvunum á Føroyaøkinum






